

# SAMRØÐUKANNING MILLUM FISKIMENN 2017

## FISKIDAGANEVNDIN 2017

*Hjalmar Hansen og Hertha Olsen*

# Innihaldsyvirlit

Fororð 1

Inngangur 2

2. Háttalag 3

3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg 7

4. Týðiligar broytingar í náttúruviðurskiftunum 9

5. Góð útlit hjá toskinum 11

6. Hýsustovnurin í stórari framgongd 17

7. Betri útlit fyri upsastovnin 22

8. Onnur fiskasløg 27

9. Fiskidagar ella kvotur 29

10. Onnur viðurskifti – m.a. friðaði økir, royndarfiskiskapur og rist 30

# Fororð

Sjeynda árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, sum virka innan Fiskidagaskipanina og fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at lata tilmælið til landstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna hjá botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Kanningin og frágreiðingin er gjørd eftir sama leisti ár um ár, soleiðis at úrslitini kunnu samanberast yvir áramál.

Hjalmar Hansen og Hertha Olsen stóðu fyri kanningini og skrivaðu frágreiðingina.

# Inngangur

Føroyska fiskivinnan á sjógvi hevur verið fyri heilt stórum broytingum seinastu árini. Talið av fiskiskipum og -bátum er minkað við 60% seinastu 9 árini og talið av monnum og kvinnum, sum hava sítt yrki á sjónum sum fiskafólk er støðugt minkað.

Í januar 2017 vóru tað umleið 1.420 menn og kvinnur, sum vóru skrásett at hava fiskiskap sum sína høvuðsinntøku (Hagstova Føroya). Hetta er ein stór minking í mun til t.d. seinnu helvt av 1980-árunum, tá fleiri enn 3.000 fólk høvdu fiskiskap sum sína høvuðsinntøku, og miðskeiðis í 2000-árunum, tá fleiri enn 2.500 fólk høvdu hesa vinnu sum sína høvuðsinntøku.

Fiskidaganevndin hevur ár um ár gjørt samrøður við fiskafólk, menn og kvinnur, umborð á føroyskum fiskiskipum, sum virka undir Fiskidagaskipanini, og sum fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum. Fyrsta samrøðukanning varð gjørd í 2011, og er hetta sostatt tann sjeynda kanningin.

Samrøðukanningin er gjørd við tí útgangsstøði, at fiskimenn og -kvinnur, hava í sínum dagliga yrki á sjónum møguleika at fáa innlit í, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, tá umræður náttúruviðurskiftini og broytingar í náttúruviðurskiftunum, fiskastovnar og broytingar hjá høvuðsfiskasløgnum, og hvørji viðurskifti hava ávirkan á, at viðurskiftini broytast.

Samrøðukanningin verður sum nevnt brúkt sum partur av grundarlagnum, tá tilmælið verður givið til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um fiskidagar, og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Samrøðukanningin í 2017 styrkir í stóran mun um góðu ábendingarnar, sum vóru í kanningini í fjør. Tí eru fleiri av niðurstøðuna tildeils líkar niðurstøðunum í fjør, tó er gongdin samanumtikið betur í 2017 enn í 2016.

# 2. Háttalag

Fiskidaganevndin hevur síðan 2011, tvs. í 7 ár, latið gjørt samrøðukanning við fiskimenn og -kvinnur um støðuna hjá botnfiskastovnunum, náttúruviðurskifti og fiskidagar..

Kanningin er eins og undanfarin ár skipað sum ein samrøðu- og spurnablaðskanning. Í 2017 var kanningin gjørd í mai mánaði, og 58 fiskimenn ella eigarar umborð á 66 ymiskum skipum og bátum luttóku í kanningini. Tað at fleiri skip eru umboðað enn spurd, er tí at tá vit spyrja ein partrolara, so umboðar hann tvey skip.

Samrøðurnar eru skrásettar í spurnablað, sum síðani er innlisið í hagtalsforrit. Harumframt verða tær nógvu hundraðtals útgreiningarnar og viðmerkingarnar í samrøðunum bólkaðar í evnir, og eru hesar viðmerkingar týðandi partur av greiningini av kanningini.

## 2.1. UMBOÐAN

Í juni 2017 vóru tilsamans útskrivaði 102 fiskiloyvir til skip og bátar í bólkunum 2, 3, 4A, 4B og 4T, og 5A. Av hesum 102 útskrivaðu loyvunum, vóru 89 skip og bátar í vinnu (ein partur av flotanum er ikki í vinnu, hóast fiskiloyvið er útskrivað).

Samrøður vórðu gjørdar við 58 fiskimenn, sum virkað undir fiskidagaskipanini. Við øðrum orðum vóru samrøður gjørdar við umboð fyri umleið 57% av útskrivaðu loyvunum ella umleið 65% av skipunum og bátunum, sum eru í vinnu. Kanningin hevur sostatt sterka umboðan.

**Fiskidagaskipanin og bólkar**

Bólkur 2: Trolarar
Bólkur 3: Línuskip
Bólkur 4A: Útróðrarbátar (15-40 BRT)
Bólkur 4B: Útróðrarbátar (40-110 BRT)
Bólkur 4T: Trolbátar
Bólkur 5A+B: Útróðrarbátar

Í myndini niðanfyri er býtið millum skipabólkarnir í kanningini í mun til útskrivaði loyvir.




Mynd 1. Svar og skipabólkar

Í flestu førum er samrøða gjørd við skiparan (81% av samrøðunum), meðan stýrimaður ella annar av manningini í 19% av førunum hevur luttikið í samrøðunum. Í ár er eingin av samrøðunum gjørd við onnur, tvs. fólk, sum eru knýtt at skipinum ella bátinum á landi.

Í heilt stóran mun eru samrøður sostatt gjørdar við fiskimenn, sum hava drúgvar royndir; við menn, sum yvir eitt langt áramál hava havt eina yrkisleið frá dekkinum á útróðrarbáti ella fiskiskipi upp á brúnna sum skipari ella stýrimaður.

## 2.2. EVNIÐ Í SAMRØÐUNUM

Evnini í samrøðunum hava ár um ár verið tey somu, við tí fyri eyga at kunna samanbera, hvat sagt verður í kanningunum.

Evnini fevna um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, um náttúruviðurskifti og æti, og harumframt verður eisini spurt um fiskidagatalið. Til seinast verður spurt um, hvør orsøkin kann verða til at fiskiskapurin eftir botnfiski hevur verið so vánaligur seinastu árini, og um nakað annað er at leggja afturat, sum ikki er spurt um. Í samrøðukanningini verður spurt um hvørji høvuðsfiskasløgini eru, og um hvussu støðan hjá hesum fiskasløgum er. Hesir spurningar verða spurdir um høvuðsfiskasløgini, t.d. galdandi fyri tosk:

- Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?
- Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?
- Er toskurin feitur?
- Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?
- Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?
- Eru onnur viðurskifti av týdningi, sum kunnu vísast á í smb. við toskin?

Í kanningini verður eisini spurt um náttúruviðurskifti og æti, og um fiskidagatal. Eisini verður í samrøðunum spurt um fiskimenn kunnu seta orð á hvørja teir meta orsøkina verða til vánaligu støðuna hjá nøkrum av høvuðsfiskasløgunum undir Føroyum seinastu árini.

## 2.3. VÍSINDALIG TILGONGD OG VERULEIKAFATAN

Fiskivinnulóggávan er skipað soleiðis, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hvørt ár skal hava ráðgeving frá Havstovuni og frá Fiskidaganevndini.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur alstóran týdning, at ráðgevingin til landsstýrismannin eisini fevnir um vitan hjá fiskimonnum og -kvinnum, sum hava sítt dagliga yrki á sjónum. Hesi skulu sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftunum í sjónum. Hesi fiskafólk eru eftir áratíggjur av persónligum royndum og eygleiðingum, styrkt við royndum og eygleiðingum, sum onnur hava borið víðari til tey, vorðin serfrøðingar á teirra øki. - Av somu orsøk hava hesi sterkt grundarlag til at siga nakað um, hvussu støðan er hjá botnfiskasløgunum, og um hvussu náttúruviðurskiftini eru.

Fyrimunurin við hesum slagnum av vísindarligari tilgongd er, at samrøðukanningin gevur eina mynd av hvussu støðan er júst nú, í tí tíðarskeiðinum, sum samrøðurnar verða gjørdar. Royndir fiskimenn við sínum dagliga yrki á sjónum gerast varugir við broytingarnar og "tulka" broytingarnar, meðan tær fara fram; og er júst hetta styrkin við hesum slag av vísindaligum kanningum. - Í mun til aðrar vísindaligar kanningar, har søgulig hagtøl og modellir ikki altíð "fanga" broytingarnar fyrr enn eftir eina ávísa tíð. Dømi eru eisini um, at stórar broytingar í náttúruviðurskiftunum ikki hava verið "fangaðar" av modellum.  Grefligasta dømi er helst tá toskurin tørnaði til aftur í 1996.

### Ymiskar tilgongdir við sama endamáli

Samrøðukanningin við fiskimenn og -kvinnur er grundað á tilgongd, har fiskimenn og -kvinnur sum serfrøðingar á sínum øki sleppa at seta orð á, hvussu tey uppliva støðuna hjá fiskastovnunum og í náttúruni.

Samrøðukanningin hevur aðra tilgongd enn t.d. kanningar hjá fiskifrøðingum, sum eru grundaðar á eitt nú yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum.

Men hóast tvær ymiskar vísindaligar tilgongdir, so hava báðar til endamáls at royna at greina og meta um, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Báðar tilgongdir hava til endamáls at styrkja vitanargrundarlagið um føroysku fiskastovnarnar og broytingarnar í náttúruni. Ein tilgongd er ikki rættari enn onnur, hóast kjakið í Føroyum leggur upp til "at velja síðu". Heldur eiga úrslitini frá báðum sløgum av kanningum at verða

brúktar í felag og í uppbyggjandi kjaki í samband við, at vit royna at styrkja vitanargrundarlagið undir skipanini av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum.

# 3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg

Í hesum partinum verður hugt nærri at luttøkuni í kanningini, sæð í mun til við hvørjum reiðskapi skip og bátar royna við, og hvørji høvuðsfiskasløgini eru.

Í kanningini telur húkaflotin 66%, meðan trolarar telja 34%; og svarar hetta nøkulunda til veruliga býtið av fiskiloyvum, har trolaraflotin (bólkur 2 og bólkur 4T) telur umleið 40% av útskrivaðu loyvunum fiskiárið 2016/2017.




Mynd 2. Svar og reiðskapur

Verður hugt nærri at hvørji høvuðsfiskasløgini eru hjá skipum og bátum, sum hava luttikið í kanningini, so siga fiskimenn, at tey mest týðandi fiskasløgini eru toskur, hýsa, upsi, longa og brosma.

Teir størru trolararnir í bólki 2 fiska serliga upsa, svartkalva, gulllaks o.a. Hjá húkaflotanum, bólkur 3, 4A, 4B, 5A, og 5B eru toskur, hýsa, longa og brosma høvuðsfiskasløg, umframt at nakrir av útróðrarbátunum serliga fiska upsa við snellu.




Mynd 3. Høvuðsfiskasløg og tal av skipum/bátum

Talvan omanfyri vísir, hvørji fiskasløg umboð fyri tað einstaka skipið metir verða høvuðsfiskasløg hjá teimum (skip og bátar hava í flestu førum fleiri høvuðsfiskasløg).

# 4. Týðiligar broytingar í náttúruviðurskiftunum

Kanningin í ár staðfestir eitt viðrák, sum kanningarnar seinastu árini hava givið ábendingar um, at ein týðilig broyting í náttúruviðurskiftunum er í vantu – við støði í metingum av æti. Nærum øll í luttóku í kanningini í ár siga, at støðan við æti er góð ella hampulig. Hetta er ein týðilig broyting í mun til árini frammaundan, men hetta er væl í trá við gongdina seinastu 3 árini.

Fram til og við 2014, hava fiskimenn og -kvinnur í samrøðunum víst á, at náttúruviðurskiftini eru vánalig, onki æti hevur verið at sæð, og ongin nebbasild, men seinastu trý árini er støðan broytt. Bæði 2015 og 2016 var tað ein heilt stórur partur av teimum, sum luttóku í kanningini, sum vístu á, at støðan viðv. æti er góð ella hampilig. Í 2017 eru tað 75% sum vísa á, at støðan er góð.




Mynd 4. Tað er ógvuliga nógv lív í sjónum

Í samrøðunum vísa fiskimenn eisini í so at siga øllum førum á, at støðan er broytt til tað betra, og hevur ikki verið so góð í fleiri ár. Einstakir fiskimenn vísa tó á, at tað ikki er nakað serligt av æti, og kemst hetta m.a. av, at tað er ymiskt hvussu nógv æti er á ymisku leiðunum kring oyggjarnar (hetta framgongur eisini greitt í samrøðunum).

Nakrar av viðmerkingunum í samrøðunum eru niðanfyri.

**Trolari:** Í fjør var nógv æti at síggja, í ár er uppaftur meira æti.

**Trolari:** Tað hevur verið nógvur krabbi í fiskinum fyrr. Nú er sild og nebbasild.

**Trolbátur:** Tað er nógv nebbasild, tað mesta eg havi sæð í 20 ár.

**Línuskip:** Tað er nógvur fuglur at síggja, meir enn í fjør, so vantandi er betur við æti eisini.

**Útróðrarbátur:** Æti er allastaðni. Tí kemur fiskurin ikki inn undir land, so sum hann plagar. Støðan við æti er góð.

**Útróðrarbátur:** Nógv æti og meira av nebbasild. Fiskurin er um at bresta av sild.

**Útróðrarbátur:** Støðan við æti er hampulig. Í 2016 var nógv æti og í byrjanini av 2017 var nógv æti, men nú – seinastu 2 mánaðirnir – hevur ikki verði so nógv.

**Útróðrarbátur:** Meira æti enn í fjør – og sera nógv er til. Nógvur svartfuglur at síggja og stórhvalur eisini at síggja.

**Útróðrarbátur:** Støðan við æti er sera góð í ár. Har eru nógv fuglavað, eisini innarlaga. Sera góður gróður í ár, men gróðurin er seinur í ár.

# 5. Góð útlit hjá toskinum

Toskurin er eitt tað fiskaslagið undir Føroyum, sum hevur størsta áhuga í kjakinum um føroysku fiskivinnuna. Góð toskaár hava vanliga eisini merkt góðar inntøkur til flotan, manningar og virkir á landi, meðan vánalig toskaár hava havt neiliga ávirkan á raksturin, um fiskikip ikki hava megna at leita aðrar leiðir og fiska onnur fiskasløg.

Støðan hjá toskastovninum hevur ikki verið nakað serlig í fleiri ár. Í undanfarnu samrøðukanningunum hevur verið víst á, at náttúruviðurskiftini ikki hava verið við, og hetta hevur sum heild havt neiliga ávirkan á botnfiskastovnarnir undir Føroyum, serliga tosk og hýsu.

Í ár lata fiskimenn tó væl at støðuni. Í samrøðukanningini siga tilsamans 95% av teimum spurdu, at støðan er góð (39%) ella hampilig (56%), meðan einans 2% siga støðuna verða ringa. Hesi sjey árini samrøðukanningin er gjørd, hava fiskimenn ikki sæð bjartari uppá støðuna enn í ár.




Mynd 5. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?

Í kanningini í 2016 lótu fiskimenn eisini væl at, og er henda gongd munandi styrkt í 2017. Í samrøðunum var eisini set orð á, at støðan er broytt til tað betra. Nakrar av viðmerkingunum eru í talvuni á næstu síðu.

**Útróðrarbátur:** Støðan hjá toskinum er góð, hann er feitur og hevur góða stødd. Toskurin gongur nógv uppi í sjónum. Lítið er til av smáum, mest 3 og 4. Toskurin hevur góð rogn til seinast í mai → sera long gýtingartíð.

**Útróðarbátur:** Støðan hjá toskinum er góð, har er nógv meir til nú – alla støddir, og fiskurin er væl í holdum. Tað sær út til at koma undan, tað er føði, og tað setur til. Ikki sikkurt at nógv verður at fáa við línu í summar, tí tað er so nógv føði (æti).

**Útróðrarbátur:** Fyri tær leiðir har smáir bátar fiska (innaru leiðir) er nógvur toskur. Blandað stødd alt eftir hvar mann fiskar. Eg havi ikki sæð tílíkt fyrr, mann fær ikki gingið á dekkinunm fyri sild.

**Útróðrarbátur:** Tilgongdin frægari enn tað hevur verið – batnar ár um ár (4 tey seinnu árini). Toskurin sveimar runt uppi í øllum sjónum. Árið í ár er annarleiðis enn onnur ár, tí har er sera nógv æti heilt út til 40 fjóðringar úr landi og ekkoloddi skrivar allastaðni.

**Útróðrarbátur:** Toskastovnurin er hampiliga væl fyri og í framgongd, feitur og góða stødd – har er ikki nógv smátt. Tað er trupult at fáa greipufisk.

**Útróðrarbátur:** Støðan hjá toskinum er í batning, tilgongdin hevur verið góð, toskurin er feitur,. Tað hevur ongantíð verið so nógv á Tangafirðið sum í vetur, har toskurin var fullur í brislingi.

**Trolbátur:** Allur toskurin hevur verið útfrá – ikki inniá – hetta er óvanligt. Eg vænti at toskurin er útifrá, tí har er so nógv æti. Toskurin er hampiliga væl fyri, feitur og gjøgnungangandi nógvur stórur toskur.

**Trolbátur:** Toskurin er væl fyri, væl í holdum og góð stødd, Nógv meir at fáa í ár, enn tey seinastu 8-10 árini.

**Trolari:** Toskurin, sum vit fiska á landgrunninum er íslandstoskur – hann hevur tenn – føroyskur toskur hevur ikki tenn.

**Línuskip:** Vit hava fiska nógv á rygginum umleið 5 tey seinastu árini – á landgrunninum royna vit stórt sæð einki. Toskurin er bæði stórur og feitur.

**Línuskip:** Vit hava ikki fiska tað stóra undir Føroyum í fleiri ár, tí vit hava verið aðrastaðni, m.a. við Ísland, New Foundland og Grønland, men stovnurin er hampiliga væl fyri.

**Trolbátar:** toskurin er væl fyri, væl í holdum og góð stødd. Tað er nógv meir at fáa í ár enn tey seinastu 8-10 árini.

## 5.1. BLANDAÐ STØDD AV TOSKI

Í samrøðunum varð víst á, at toskurin er av blandaðari stødd. Ein stórur meiriluti segði, at toskurin er miðalstødd. Omanfyri 20% siga at toskurin er stórur. Nakrar viðmerkingar eru eisini um, at tað er trupult at fáa greipufisk. Mynd 6 vísir út frá kanningini í ár, at tað er lítið ella einki til at smáum toski – hetta skal tó takast við tí fyrivarni, at fleiri svar eru í bólkinum "Annað", sum m.a. eru útsagnir um at støddin er blanda, ofta allar støddir, herímillum er eisini smáur fiskur.




Mynd 6. Hvussu við støddini á toskinum – er fiskurin stórur ella?

## 5.2. TOSKURIN ER FEITUR

Seinastu árini hava fiskimenn og -kvinnur í samrøðukanningini víst á, at føðigrundarlagið hjá botnfiskastovnunum er vorðið betur, ikki minst er hetta galdandi fyri nebbasildina, sum er ein týðandi partur av føðigrundarlagnum hjá toski.

Í tráð við hetta verður eisini í samrøðukanningini sagt, at fiskurin sum heild er feitur í ár. Hetta er eisini galdandi fyri toskin. 95% av teimum, sum hava luttikið í kanningini siga, at toskurin er feitur. 5% siga toskin verða miðalfeitan, meðan ongin sigur at toskurin ikki er feitur.




Mynd 7. Toskurin er feitur

At toskurin er feitur og væl fyri hevur eisini týdning fyri framtíðar vónirnar til toskafiskiskapin. Og verður eisini í samrøðukanningini víst á, at tað sær gott út hjá toskinum og vónirnar eru góðar til komandi tíðir.

## 5.3. TILGONGDIN - ENN BETUR ENN Í FJØR

Árini 2012 til 2014 vóru fiskimenn og -kvinnur, sum luttóku í samrøðukanningunum, í stóran mun samd um, at tilgongdin hjá toskinum var frá ringum til í besta føri hampilig. Bert heilt fá søgdu tilgongdina verða góða, meðan tað t.d. í 2013 vóru fleiri enn 75%, sum søgdu tilgongdina av toski verða ringa.

Frá 2015 og til kanningina í ár, er ein stór broyting. Í 2015 søgdu 59% av teimum, sum luttóku í kanningini, at tilgongdin var góð ella hampulig. Í 2016 vóru tað 71%, sum góðu hetta svar og í ár svara 82%, at tilgongdin er góð ella hampulig.




Mynd 8. Tilgongdin av toski er betri enn undanfarin ár

Í samrøðukanningini í ár, eru fiskimenn sum heild positivir. Fleiri enn 20% siga tilgongdina av toski verða góða, meðan umleið 60% siga hana verða hampiliga. Í mun til undanfarnu 4 árini, so eru tað lutfalsliga fáir fiskimenn, sum í ár siga tilgongdina verða ringa, bert 8% í mun til 74% í 2013, tá ringast stóð til.

## 5.4. SAMANUMTIKIÐ: LATA VÆL AT STØÐUNI HJÁ TOSKINUM

Fiskimenn og -kvinnur hava seinastu trý árini latið hampiliga væl at støðuni hjá toskinum. Samanborið við undanfarin ár, sí mynd 9, siga 97% av teimum, sum luttaka í kanningini, at støðan er góð ella hampulig, meðan eingin sigur støðuna verða ringa.

Í 2011 lótu fiskimenn og -kvinnur hampiliga væl at støðuni hjá toskastovninum. Hampilig tilgongd var í væntu, men hendan støðan broyttist heilt í 2012 og 2013. Høvuðsorsøkin var, at náttúruumstøðurnar ikki vóru við, m.a. var og lítið at eta hjá toskinum.

Tey seinastu 3 árini er í samrøðukanningunum víst á, at støðan hjá toskinum er vorðin betri og betri. Náttúruviðurskiftini tykjast eisini at broytast til tað betra, tí hesi seinastu trý árini hava fiskimenn latið sera væl at støðuni við æti, og ikki minst viðv. nebbasild.

Hesi viðurskifti gera, at fiskimenn í 2017 meta støðuna hjá toskinum verða góða ella hampiliga í mun til undanfarin ár, eins og víst í mynd 9 niðanfyri.




Mynd 9. Støðan hjá toskinum er betri enn undanfarin ár

# 6. Hýsustovnurin í stórari framgongd

Seinastu fýra árini hevur verið víst á í samrøðukanningini, at tað gongur rætta vegin hjá hýsuni, hetta er eisini galdandi fyri samrøðukanningina í ár. Serliga í mun til árini 2011 til 2013, tá støðan var sera vánalig

Í 2017 eru tað øll (100%) sum siga støðuna verða hampiliga ella góða. At broytingin er ógvuliga stór, kann síggjast í mun til 2012 tá 85% í samrøðukanningunum søgdu støðuna hjá hýsuni verða ringa. Í ár er tað eingin, sum sigur støðuna verða ringa.




Mynd 10. Hýsan í framhaldandi framgongd.

Í samrøðunum vístu fleiri eisini á, at støðan hjá hýsuni sær betri út enn undanfarin ár. Nakrar av viðmerkingunum eru í talvuni niðanfyri.

**Útróðrarbátur:** Hýsan er væl í holdum, nógv smátt er uppi í – annars fær man nógv meir stóra hýsu, enn man hevur fingið leingi. Hýsan er tann stovnurin sum er best fyri – har er sera nógv yngul at síggja

**Útróðrarbátur:** allar støddir eru at fáa, nógv smátt (yngul – undir 500 gram) er alla staðni, so tilgongdin hevur verið góð. Hýsan er væl fyri. Men man fær eisini stóra hýsu

**Útróðrarbátur:** støðan hjá hýsuni er betur enn hon hevur verið leingi, har eru allar støddir – mest stór hýsa at fáa (nr 2), men eisini nógv yngul er uppi í

**Útróðrarbátur:** í mongd líkist árið seinastu 2-3 árunum, men nú er nógv meir smátt at fáa. Hýsan er væl í holdum, og allar støddir eru at fáa

**Trolari:** góð tilgongd av smáhýsu í ár – eitt tað besta í nógv ár

**Trolbátur:** nógv hýsuyngul er í netinum og í maganum á fiskinum

**Línuskip:** Vit hava ikki fiska hýsu undir Føroyum í eitt ár – tí vit hava verið aðrastaðni, m.a. við Ísland, New Foundland og Grønland, men stovnurin er hampiliga væl fyri, miðal stødd og feitur fiskur

**Línuskip:** Støðan er nógv betur enn hon hevur verið í fleiri ár, tí nógv smátt er at fáa.

## 6.1. BLANDAÐ STØDD AV HÝSU

Fiskimenn vísa í samrøðukanningini á, at støddin av hýsuni sum heild er er góð blanda stødd. Tó eru tað fleiri í 2017 (16%) í mun til 2016 (7%), sum svara at fiskurin er stórur. Samanborið við t.d. 2011, tá tað var at kallað bara stór hýsa at fáa, eru farnar broytingar fram, har støddirnar eru meiri blandaðar, og hetta verður mett at verða eitt gott tekin, sí mynd 11 niðanfyri.




Mynd 11. Hýsan hevur góða blandaða stødd

### 6.2. HÝSAN ER FEIT

Eins og við toskinum, so eru fiskimenn á einum máli um, at hýsan er feit. 94% av teimum, sum luttóku í kanningini søgdu hýsuna verða feita, meðan 6% søgdu hýsuna verða miðalfeita.




Mynd 12. Hýsan er feit

## 6.3. HÝSUTILGONGDIN ER MUNANDI BETRI

Fiskimenn eru eisini í samrøðukanningini meira jaligir um tilgongdina hjá hýsuni, í mun til undanfarin ár. Árini 2011 og 2012 vóru fiskimenn ørkymlaðir um vánaligu tilgongdina, men í 2017 siga 37% tilgongdina verða hampiliga, meðan 57% siga tilgongdina verða góða. Einans 7% siga tilgongdina verða ringa.

Í 2016, vóru tað tilsamans 69%, sum vístu á at tilgongdin var góð ella hampulig, meðan tað í 2017, eru 94 %, sum vísa á at tilgongdin er góð ella hampulig. Stóra broytingin er í talinum, sum sigur at tilgongdin er góð, frá 10% í 2015 til 57% í 2017.

Fleiri trolarar vísa á, at hýsuyngul hongur í netinum. Húkamenn vísa á, at teir síggja fitt av smáari hýsu. Hetta gevur ábendingar um, at góðir árgangir eru á veg.




Mynd 13. Munandi betri tilgongd av hýsu enn undanfarin ár

## 6.4. SAMANUMTIKIÐ: GONGUR RÆTTA VEGIN HJÁ HÝSUNI

Tendensurin seinastu trý til fýra árini hevur verið rættiliga greiður: Tað eru alsamt fleiri, sum meta støðuna hjá hýsuni verða betri og betri, fyri ikki at siga góða. Spurd um hvussu støðan hjá hýsuni er í mun til undanfarin ár, eru tað nærum øll (93%) av teimum, sum luttóku í kanningini, sum siga, at støðan er hampilig ella góð. 53% siga støðuna verða betri enn undanfarin ár, 40% siga støðuna verða hampiliga í mun til undanfarin ár, meðan eingin sigur støðuna verða ringa í mun til undanfarin ár.




Mynd 14. Gongur rætta vegin hjá hýsuni

Í samrøðunum varð eisini víst á, at støðan hjá hýsuni er góð og munandi betri enn undanfarin ár. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

**Útróðrarbátur:** Hýsustovnurin er væl fyri, har eru allar støddir, tó rættiliga nógv smátt. Og fiskurin er feitur. Í 2012 og 2013 var einki smátt, men 2014 kom broyting í og tað heldur áfram við at koma nógv smátt inn í stovnin.

**Útróðrarbátur:** Í mongd líkist árið í ár seinastu 2-3 árunum, men nú er nógv meir smátt at fáa. Hýsan er væl í holdum, og allar støddir eru at fáa.

**Útróðrarbátur:** Hýsan er væl í holdum, nógv smátt er uppi í – annars fær man nógv meir stóra hýsu enn man hevur fingið leingi. Hýsan er tann stovnurin, sum er best fyri – har er sera nógv yngul at síggja.

# 7. Betri útlit fyri upsastovnin

Tey seinastu ártíggjuni er upsin tað fiskaslagið, sum fiskað er mest av av botnfiskasløgnum undir Føroyum. Upsin verður í stóran mun fiskaður av trolarum, men bæði línuskip og útróðrarbátar fiska eisini upsa.

## 7.1. UPSIN ER BETUR FYRI

Samrøðukanningin í 2016 gav ábendingar um, at fiskimenn hildu støðuna hjá upsanum verða heldur betur enn árini framman undan. Tá søgdu um 15% at støðan var góð, og sløk 25% vístu á onnur viðurskifti, har serliga var víst á, at tað var heilt óvanliga nógv av smáum upsa.

Fiskimenn siga gongdina í 2017 verða munandi betur. Góð 21% siga hana verða góða, meðan 50% siga støðuna verða hampiliga. Tað er tí sermerkt at heili 29% siga støðuna verða ringa. Eftir viðmerkingunum at døma, so kann hetta hava samband við, at fiskmenn siga at nógv er til av smáum upsa. Soleiðis hevur verið í fleiri ár. Men spurningurin sum ferð eftir ferð stingur seg upp er: Hvar er tann stóri upsin? Samrøðukanningin er gjørd í mai mánaða áðrenn góði fiskiskapurin í summar byrjaði, og tí er sannlíkt at hetta hevur ávirka svarúrsliti. Hevði kanningin vart til juni mánaða, so høvdu metingarnar fyri upsastovnin meir sannlíkt verði positivari.




Mynd 15. Støðan hjá upsanum

Í samrøðukanningini varð eisini í viðmerkingum víst á hvussu støðan hjá upsanum er. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

**Trolari:** Makrelurin hevur broytt gongdina av upsanum, tí er ikki so lætt at fáa upsa.

**Trolari:** Tað er nógvur smáupsi, men hvar er tann stóri upsin?

**Trolari**: Um summari er nógv at fáa av upsa – soleiðis var tað ikki fyrr.

**Trolari**: Nokk er til av upsa – hóast stongdar leiðir.

**Trolari:** Einki várfiskarí hevur verið í ár, heldur einki var í fjør.

**Trolari:** Nógvir fiska smáupsa, men vit royna – og fáa yvirvaksnan upsa eysturi í slættanum.

**Trolari:** Gýtingin er ikki tann sama sum fyrr, gýtingin er nógv meir spjadd.

**Trolbátar:** vit fáa onkuntíð eitt sindur av upsa, og meir enn vit plaga at fáa. Vit eru ikki áhugaðir í upsa

## 7.2. UPSIN ER HELDUR STØRRI NÚ

40% av teimum, sum luttóku í kanningini, siga at upsin hevur miðal stødd. Somuleiðis eru tað 40%, sum siga at upsin er smáfallandi, meðan tilsamans 13% siga at upsin er stórur. Tað eru einans snellubátar, sum siga at upsin er stórur. Hetta er ein munandu broyting frá 2016, tá heili 75% søgdu at upsin var smáfallandi og einans 15% at hann var miðal, og einans 5% at hann var stórur. Broyting í tølunum frá 2016 fyri smáa upsan til tølini í 2017 fyri miðal upsan, geva greiðar ábendingar um, at metingin í 2016 sæst aftur í fiskiskapinum í ár. Sum heild verður víst á, at upsin er smáfallandi, tó vísa einstakir útróðrarbátar, sum fiska upsa við snellu á, at teir hava fingið stóran upsa.




Mynd 16. Meir er til av størri og miðal upsa

## 7.3 UPSIN ER FEITUR

Allir sum luttakað í samrøðukanningini siga at upsin er í góðum standi. 100% av teimum, sum luttóku í kanningini, siga upsan verða feitan. Tað er ein tíðulig gongd frá 2014 til 2017, har tað ár um ár verður sagt, at upsin er betur og betur fyri.




Mynd 17. Upsin er feitur

Í samrøðunum var víst á, at upsin hevði nokk at eta, og er hetta eisini í tráð við tað, sum verður sagt í samband við bæði toskin og hýsuna.

## 7.4. STØÐUGT BATNANDI UPSATILGONGD

Nógvi smái upsin, sum er komin inn í fiskiskapin í 2016 og í 2017 er greið ábending um, at tilgongdin er broytt til tað betra. Undanfarin ár, serliga árini 2013, 2014 og 2015, vístu nógv í samrøðukanningini á, at tilgongdin hevði verið ring. Men hendan støðan er broytt. Í 2017 siga 47% at tilgongdin er góð. Hetta er annað árið á rað, at stórsti parturin av fiskimonnum siga tilgongdina verða góða, og ein munandi broyting samanborið við árini 2014 og 2015, har eingin fiskimaður segði tilgongdina verða góða.

Viðmerkjast skal at 20% siga at tilgongdin er ring.  Hetta er tó munandi minni enn tað hevur verið seinastu 4 undanfarnu árini.




Mynd 18. Upsatilgongdin munandi broytt til tað betra

## 7.5. SAMANUMTIKIÐ: FISKIMENN VARNIR Í METINGINI UM STØÐUNA HJÁ UPSANUM

Hóast upsin er feitur og tilgongdin hevur verið góð seinasta árið, so eru fiskimenn, sum hava luttikið í kanningini, varnir í metingini um støðuna hjá upsanum í mun til undanfarin ár, sí mynd 19.  Felags fyri so at siga øll árini kanningin er gjørd er, at um 60% á hvørjum ári hava sagt at støðan er hampulig.  Ein týðulig broyting í ár er tó, at 20% siga støðuna verða góða, meðan tað einans vóru 5% í 2016, sum søgdu støðuna verða góða.

Út frá spurningum framman undan, er tó greitt at fiskimenn, sum luttakað í kanningini sum heild siga støðuna verða munandi betri, serliga í mun til seinastu 2-3 árini.




Mynd 19. Støðan hjá upsanum í mun til undanfarin ár.

Útfrá samrøðunum bendir á, at tann óvanliga nógvi smái upsin ger, at fiskimenn eru ymiskir á máli um hvussu støðan hjá upsanum er.

# 8. Onnur fiskasløg

Skip og bátar, ið virka undir Fiskidagaskipaninim, fiska sjálvsagt onnur fiskasløg enn tosk, hýsu og upsa. Í samrøðukanningunum blivu nøkur av hesum fiskasløgum umrødd.

## 8.1. LONGA OG BROSMA

Fleiri línuskip og útróðrarbátar hava seinastu árini fiska longu og brosmu. Mongdirnar eru ikki vaksandi, tí línuskipini fiska við Ísland, Grønland og New Foundland.

Sum heild verður víst á, at tað er støðugur fiskiskapur eftir longu og brosmu, og fiskurin sum heild er feitur.

## 8.2. SVARTKALVI

Bæði línuskip, trolarar og garnaskip fiska svartkalva (garnaskipini eru tó ikki undir fiskidagaskipanini). Eins og við øllum hinum fiskasløgunum, so eru menn á einum máli um, at svartkalvin er sera feitur og hevur góða stødd. Víst verður eisini í kanningini á, at talan ikki er um stóran stovn, sum tó er støðugur.  Veiðan í ár hevur verið ein tann besta í nógv ár. Tó er onkur sum metir, at ov nógvir bátar royna eftir svartkalva.

## 8.3. HAVTASKA

Fiskmenn eru í ár meira ivasamir um støðuna hjá havtaskuni enn undanfarin ár. Havtaskan er feit og hevur eina hampiliga stødd, tí allar støddir eru at fáa, alt eftir hvar man fiskar,  men støðan er ikki betur enn hampilig. Eingin sigur at støðan er góð.

## 8.4. REYÐSPRØKA OG TUNGA

Tað eru serliga trolbátarnir, sum fiska reyðsprøku og tungu. Víst verður í samrøðukanningini á, at tað er meir til av reyðsprøku og tungu. Bæði reyðsprøkan og tungan eru væl í holdum, hava góða stødd og nógv er til.

## 8.5. KALVI

Fiskimenn meta ikki at støðan hjá kalvanum er góð, hóast kalvin er stórur og feitur. Eitthvørt er neyðugt at gera uppundir gýting, eitt nú at friða gýtingarøkið, og ikki lata tað ov tíðliga upp aftur eftir gýting.

## 8.6. SKØTA

Støðan hjá skøtuni er góð. Skøtan hevur góða støðd og er feit.

## 8.7. KONGAFISKUR

Nógvur stórur og feitur kongafiskur at fáa.

## 8.8. GULLLAKSUR

Tað er hampiliga fitt av gulllaksi at fáa, sum bæði er feitur og stórur. Fiskaríi hevur tó svinga eitt sindur í ár, tí tað er eitt sindur skiftandi við, um man fær stóran og/ella smáan gulllaks. Við at skipini flyta eitt sindur runt tá fiskað verður, so eru bæði mongd og støðd í lagið. Fiskimenn meta tí at støðan hjá gulllaksastovnurin er hampiliga góð.

# 9. Fiskidagar ella kvotur

Nú fiskivinnan stendur fyri stórum broytingum og fleiri uppskot um nýggja lóg fyri fiskivinnuna liggja í Løgtinginum, brúkti Fiskidaganevndin møguleikan til at spyrja fiskimenn um teirra støðu til hesa broyting.

Úrslitið er tvíbýtt. So at siga eingin fiskimaður, sum fiskar við línu ella teimum minnu trolarunum, sigur seg takað undir við kvotaskipan. Hjá hesum er stórsti vandin útblaking og manglandi ella ov lág hjáveiðukvota í blandaðum fiskiskapi.

Hjá fiskimonnum við teimum størru trolarunum er støðan ikki so greið. Av teimum spurdu er størri helmingurin (55%) ímóti eini kvotaskipan, meðan tann minna helvtin (45%) er antin fyri ella einki hava ímóti eini kvotaskipan. Stórstu vandamálini við eini kvotaskipan verða lýst við: útblaking og tørvur á munandi betri eftirliti.

Í talvuni niðanfyri eru nakrar av viðmerkingunum í smb. við spurningin um fiskidagar ella kvotur.

**Línuskip**: Tað ber ikki til við kvotum undir Føroyum, tá man fiskar við línu. Aðra staðir eru grunnarir so stórir – tá kanst tú verða t.d. á reinari hýsuleið ella toskaleið.

**Línuskip:** Tað verður ein skandala við kvotum. Kvoturnar verða so lítlar at eingin kann liva av tí. Tann, sum dugir best at verða banditt fer at klára seg. Tað er ikki gott fyri grunnin.

**Útróðrarbátur:** Eg vil ikki hava kvotur, tí tað fer at føra til útblaking.

**Útróðrabátur:** Smábátar skulu fiska ótarna. Veðri stýrir fiskarínum.

**Trolari:** Um rist kemur í fyri at verja ungfiskin, so er kvotaskipan góð.

**Trolari:** Eg havi fiska nógv undir kvotaskipan í Noreg, har var eingin útblaking.

# 10. Onnur viðurskifti – m.a. friðaði økir, royndarfiskiskapur og rist

Í samrøðukanningini bleiv spurt um, um tað eru onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri fiskaríi. Her vóru tað nógvir fiskimenn, sum høvdu eina greiða meining um ymisk viðurskifti, eitt nú stongd økir, friðaði økir, rist í trolinum, og hvørja ávirkan makrelurin hevur á botnfiskastovnarnar.

Samrøðukanningin vísti á, at tað er ílagið at friða fiskiøki fyri ungfisk, men fiskimenn meta út frá samrøðukanningini, at fleiri kanningar eiga at gerast, samstundis sum friðingar verða gjørdar. Økið skal ikki lata upp aftur, fyrr enn munandi minni ungfiskur er á økinum.

Í gýtingartíðini skal fiskurin fáa frið at gýta, so her er neyðugt at fylgja við, nær gýtingartíðin endar. Fyri fleiri fiskasløg meta menn, at gýtingartíðin møguliga er broytt eitt sindur. Fyri upsan er gýtingartíðin longd, og upsin gýtir eisini meir víða um.

Fyri at forða fyri upp íblanding av ungum fiski, so er partur av vinnuni til reiðar at brúka rist.

Línuskipini mugu til tíðir liggja tí trupult er at fáa manning. Hetta er so ein av orsøkunum til, at veiðan hjá línuskipunum ikki er so høg.

# FISKIDAGANEVNDIN 2017

Í talvuni niðanfyri eru nakrar av viðmerkingunum í smb. friðingar, royndarveiðu og rist.

**Útróðrarbátur:** Gýtingarøkið hjá upsa er eystan fyri Fugloynna, Vit fáa lov at fiska upsan ov tíðliga. Fiskurin fær ikki lov at vaksa, Upsin skal fáa lov at gýta minst eina ferð áðrenn hann verður fiskaður.

**Trolari:** Sera stórur partur av landgrunninum er stongdur

**Trolari:** Hví lata stongdar leiðir ikki upp aftur?
**Trolari:** Tað er sera nógv og ofta bráfangisveiðibann – so tí fær man so lítið av fiski

**Útróðrarbátur:** Magnus Heinason trolar á gýtingarleið – tað er ikki gott. Magnus skal taka royndirnar áðrenn ella eftir gýting.

**Útróðrarbátur:** 1997 var fyrsta ár við friðingum og tað er ikki blivin meir fiskur. Hví kemur fiskurin ikki fyri seg aftur? Tað loysir seg ikki at friða?

**Útróðrarbátur:** fyri 2-3 ár síðani, tá vóru so nógvir størri smáir línubátar. Teir settu í klettin og fiskaðu tann smáa fiskin. Teir skulu ikki sleppa inn um 3 fjóðringar – tí teir fiska so nógv smátt, og hava nógva og langa línu

**Trolari:** Man skuldi brúkt rist – alt fiskarí skuldi brúkt rist – eisini toskafiskarí

**Trolari**: Ungfiskurin hevur verið ov illa vardur – har burdi verið rist í trolinum

**Trolari:** Makrelurin hevur broytt gongdina av upsanum, so tí er ikki so lætt at fáa upsa

**Útróðrarbátur:** Hvussu nógvum fiski er tað pláss fyri í havinum runt Føroyar. Man skal tí ikki hyggja einsamalt eftir botnfiskastovnunum – men eftir allari vistskipanini (økoskipan).

**Útróðrarbátur:** Trupulleikin er at fáa fólk umborð á skipini. Línuskipini fáa ikki fólk – politikkarnir skilja ikki hetta